# Ársfrágreiðing 2021

Vegna koronustøðuna varð aðalfundurin hjá Diabetesfelagnum í fjør ikki fyrr enn 15. september, so tað er bert eitt gott hálvt ár síðani. Nevndin hevur havt seks fundir síðani tá.

## Megd 40 ár

Tann 22. oktober 2021 hevði Megd 40-ára føðingardag, sum varð hildin í Norðurlandahúsinum.

Øll limafeløgini vóru boðin at hava ein bás, har høvi var at hava kunnandi tiltøk. Forkvinnan, Allan Skaalum, nevndarlimur, og Brynhild Thomsen, samskiftisfólk, umboðaðu Diabetesfelagið hendan dagin.

Frammanundan høvdu vit gjørt avtalu við ***Videncenter for Diabetes*** um at fáa loyvi at brúka tveir diabetesfilmar, sum tey hava framleitt við danskari talu og teksti. Annar eru um typu 1- og hin um typu 2-diabetes.

Vit fingu Nudlavirkið at seta føroyska talu og tekst til filmarnar, sum vórðu klárir til Megd-føðingardagin, og teir blivu vístir á stórum sjónvarpsskíggja í forhøllini í Norðurlandahúsinum hendan dagin.

Aftrat hesum bjóðaðu vit fólki at fáa mált blóðsukur og annars at screena seg fyri typu 2-diabetes eftir tí finska screening-amboðnum, FINDrisk. Fleiri nýttu høvi til tað.

Eitt hæddarpunkt á degnum var ein snøgg bók, sum varð løgd fram, og sum Megd hevur latið skrivað um, hvussu tað er at liva við teimum ymsu sjúkunum, sum eru umboðaðar av limafeløgunum í Megd. Ambassadørurin fyri Diabetesfelagið var ein skilagóður og fittur ungur maður, sum eitur Hans Otto Holm. Hann og foreldur hansara greiða í bókini frá, hvussu tað er hjá einum barni at liva við typu 1-diabetes og hvussu tað ávirkar familjuna og gerandisdagin.

Hans Otto er her í dag, og vit í nevndini eru øgiliga glað fyri, at tú segði ja til hesa uppgávuna, Hans Otto. Og tí vilja vit geva tær hetta gávukortið at keypa tær okkurt, sum tú ynskir tær. Túsund takk fyri, at tú ert eitt so gott og virkið umboð!

Samanumtikið kann sigast, at dagurin í NLH var eitt gott høvi hjá limafeløgunum í Megd at vera sjónlig í einum høpi, har nógv fólk vóru til staðar, og afturat tí, so var møguligt hjá teimum ymsu feløgunum at heilsa uppá og stimbra hvørt annað.

Filmarnir, sum eg nevndi, liggja eisini á heimasíðuni hjá okkum, diabetes.fo, og eru væl í tráð við ta strategi, sum nevndin hevur, nevniliga at kunna um diabetes í føroyska samfelagnum.

Serliga tykist at vera tørvur á at kunna um, at diabetes er eitt felagsheiti fyri fleiri sjúkur, serliga býttar upp í typu 1 og typu 2. Rættiliga mong fólk, eisini skúlanæmingar, sum skriva uppgávur, venda sær til felagið fyri at fáa vitan um diabetes. Vit hava í stóran mun manglað tilfar á føroyskum, sum vit kunnu vísa teimum á, og hetta er nakað av tí, sum ætlanin at brúka heimasíðuna til.

# Altjóða diabetesdagur

14. november, sum er altjóða diabetesdagur, høvdu vit lagt eitt tiltak til rættis, sum skuldi seta fokus á, at tað júst eru 100 ár liðin síðani, at insulin varð tikið í brúk sum viðgerð av typu 1 diabetes. Hetta var eitt risalop í granskingini og viðgerðini av diabetes, men korona gjørdi, at tað bleiv útsett. Hetta fara vit at hoyra meira um eftir aðalfundin, tá limatiltakið verður, og Jens Andreassen og Herborg Johannesen koma at hava framløgu.

# Norðurlendska samstarvið

Norðurlendsku diabetesfeløgini hava vanliga eitt rættiliga tætt og gott samstarv. Hetta, sum alt annað hevur verið ávirkað av koronustøðuni. Nordic Forum hevur ikki verið hildið, síðani tað var í Føroyum í 2018, fyrst vegna fíggjarligu støðuna og umleggingar í danska felagnum, og síðani vegna koronu.

Vit hava tó havt regluligar fundir á Teams, og tað hevur verið gott og gevandi, hóast ikki tað sama sum at møtast andlit til andlits. Nú er ætlanin, at Nordic Forum verður í Danmark í august, har umboð frá Diabetesfelagnum fara at luttaka.

Í hesum høpi kann nevnast, at nevndin í Diabetesfelagnum, fegin vildi ynskt, at ung fólk við diabetes gjørdust virkin bæði í felagnum og í norðurlendskum og altjóða samstarvi. Vit verða støðugt boðin við til slík samstarvstiltøk, so um her eru onkur ung, ella tit vita onkur, sum hava áhugað, so latið okkum vita tað, tí so taka vit tráðin upp.

Í fleiri ár hava vit havt ein ungan persón (undir 30 ár) við í nevndini, men í løtuni er eingin. Nevndin hevur havt frammi, at um vit fáa lív í virksemið millum ung, so skulu tey vera vælkomin við á nevndarfundir, soleiðis at vit kunnu virka í felag.

# Screening og fyribyrging

Granskarar og heilsustovnar hava í áravís kallað typu 2-diabetes fyri eina pandemi – eina alheims farsótt.

Í dag vita øll, hvat ein pandemi er, og at tá ein slík herjar, so er týdningarmikið at gera nakað við støðuna, so hon ikki fær ov stórt tak á okkum.

Tøl frá IDF, altjóða diabetesfelagsskapinum, vísa, at 537 milliónir vaksin fólk (20-79 ár) liva við diabetes, og væntandi verður hetta talið 643 milliónir í 2030 og 783 í 2045.

Í hesum tølunum hava 90% typu 2 diabetes, 8% typu 1 diabetes og 2% aðrar variantar av diabetes.

https://idf.org/aboutdiabetes/what-is-diabetes/facts-figures.html

Hóast vit ikki hava nøkur nýggj tøl, sum siga, hvussu nógvir føroyingar hava typu 2-diabetes, so er nógv, sum bendir á, at vit liggja á sama stigi, sum londini í vesturheiminum.

Vit vita, at typa 2-diabetes í ein mun kann fyribyrgjast, og at um sjúkan verður staðfest tíðliga, so ber til at minka um skaðiligu árinini av henni. Árinini eru nevniliga tey, sum føra til aðrar støður, óvirkni og deyða. Vit hava tí sett okkum fyri, at vit vilja ganga undan í

almentgagnligu kunningini um typu 2-diabetes í okkara samfelag.

Vit hava verið í sambandi við lýsingarráðgevar, sum hava víst á møguleikar fyri kampagnum/lýsingarátøkum, sum kunnu fáa fólk at fara til lækna og screena seg fyri typu 2-diabetes.

Tí søktu vit í januar Betri um stuðul til eina slíka kampagnu, og Diabetesfelagið fekk játtað 190.000 krónur.

Nevndin arbeiðir í løtuni við eini ætlan fyri, hvussu hendan skal skipast, og vit fara ráðføra okkum við ymsar stovnar og feløg, so sum diabetsambulatoriið, kommunulæknafelagið og onnur.

# Steno Diabetessentur

Arbeiðið við at seta á stovn eitt Steno Diabetessentur í Føroyum er framvegis í gongd.

Í juni í fjør góðkendi Heilsumálaráðið eina 'Vision for styrket diabetes og anden endokrinologisk indsats på Færøerne' https://novonordiskfonden.dk/wp-content/uploads/20210510-SDCF-Visionsoplaeg-FINAL.pdf , sum skuldi vera eitt grundarlag fyri einum neyvari ætlan um, hvussu eitt Steno Diabetessentur í Føroyum skuldi skipast.

Í heyst vórðu ymsir bólkar mannaðir, og hesir arbeiða í løtuni við ítøkiligum uppskotum, hvussu tey ymsu umráðini skulu skipast. Tað verður arbeitt innan trý høvuðsøki:

1. forebyggelse og behandling af diabetes og andre endokrinologiske sygdomme;
2. tværsektorielt samarbejde vedrørende behandlingsforløb, uddannelse, og kompetenceudvikling;
3. forskning.

Diabetesfelagið hevur verið og er ein náttúrligur partur í hesum arbeiði frá byrjanini, og vit eru nú umboðað í bólki nr. 2, sum arbeiðir við tvørsektorellum samstarvi, har uppgávan verður lýst soleiðis í visiónsuppritinum:

> *Anden målsætning er et stærkt tværsektorielt samarbejde med fokus på kvalitet, **patientuddannelse** og **kompetenceudvikling**. SDCF skal styrke samarbejdet mellem sygehuset og almen praksis for at sikre en ensartet høj behandlingskvalitet og patientcentrerede patientforløb. Dette skal ske i et nært samarbejde med almen praksis, hvor **sygehuset i endnu højere grad understøtter behandlingen i primærsektoren**. I samarbejdet vil der særligt være fokus på kvalitetsudvikling, patientuddannelse samt kompetenceudvikling til sundhedsprofessionelle.*
>
> *Målet er at forbedre livskvalitet og øge livslængde for alle patienter samt at forebygge diabetes.*

Í hesum arbeiðinum er ætlanin at savna ein bólk við eini 4-6 fólkum við typu 2-diabetes fyri at hoyra teirra hugsan um, hvat hevur

týdning fyri, um eitt tvørsektorielt samstarv eydnast.

Hendan sokallaða 'fokusbólkasamrøðan'verður longu í næstu viku.

Eftir ætlan skal handritið vera liðugt í juni mánaði, so at man kann arbeiða fram í móti, at Steno-sentur kann setast á stovn í januar mánaði næsta ár.

# Marna úr nevndini

Marna Hentze, sum hevur verið virkin í nevndini, hevur vegna persónligar orsøkir ynskt at verið loyst frá hesi uppgávuni. Vit takka Marnu fyri hennara íkast hesa tíðina, sum hon hevur verið í nevndini.

Tí skulu vit í dag finna ein avloysara fyri hana. Hon stendur ikki fyri vali, fyrr enn í næsta ár.

At enda vil eg takka tykkum, sum eru møtt til fundin, og ynskja, at vit í felag mugu arbeiða fyri, at fólk við diabetes hava bestu kor at liva undir.

Tórshavn hin 20. apríl 2022

May-Britt Skoradal, forkvinna